# Víkingabústaður í Seyrvági

## (Trace of viking settlement in Seyrvágur, Vágar)

*Eftir Sverra Dahl.*

### *I Inngangur.*

Várið 1957 varð grivið fyri grund til fimleikarhöll tætt vestan fyri nýggja skúlan í Seyrvági; teir komu tá niður á laðað grót, sum monnum tókti vera toftaleivdir, og sóknarstýrið boðaði tí frá hesum. Eingin veit um at siga, at nakar hevur búð á hesum staði, og sögn er eingin. Tað lá so fyri, at rannsóknin kundi verða gjörd beinan vegin við stuðuli frá sóknarstýrinum.[1])

### *II Staðarlýsing.*

Tann gamla bygdin stóð, og ger tað mest enn, inni á botni í váginum, og var tá óbygt úteftir norðara vágsarminum út til staðin, har ið hesin fundur varð gjördur, tað er uttanfyri og niðan á skák frá kirkjuni, ið stendur fyri seg sjálva *niðri á Oyrini.* (1. mynd).

Niðan frá Oyrini er væl vallaður heldur brattur og eitt sindur heyggjutur böur, sum, har ið toftin er, verður nevndur *úti undir Skorum.* Oman gjögnum lítið gil rennur lítil á, *Hanusá,* og beint vestan fyri hana stendur toftin, ið higar til hevur hómast sum rundleitt, lág herða.

---

[1]) Tásitandi sóknarstýri verður veitt besta tökk fyri henda dugnað.

*III Rannsóknin.*

Áðrenn rannsóknin byrjaði var longu frammanundan grivin djúp gryvja gjögnum toftalendið, og *Hanusá* lögd undir heilt í sementrennu, *(sí 2. mynd, eystast í skurðunum og 3. mynd).* So væl vildi kortini til, at bara eystasti partur av eystara vegginum og nakað av gólvinum var skalað.

Hyggja vit at 2. mynd síggja vit tveir tvörskurðir gjögnum toftina, ovari á myndini ein norðara skurð, merktan *y 16 m,* og niðari ein sunnara skurð, merktan *y 12,25 m,* á *3. mynd,* sum er flatatekning av toftini.

*Skurður y 16 m* (norðari skurður). Ovast í skurðinum sæst mold, moldflógvin er fyri tað mesta tunn, 10—50 cm, og heilt tunn oman á stórum jarðkletti vestantil í skurðinum. Beint undir moldini eru eystan- og vestantil og í miðjuni á skurðinum veggjaleivdir og millum tær gólvskón av sandi, mold og ösku. Undir gólvinum er leir (morenuleir).

Eystast í skurðinum, eystan fyri sementrennu, sæst undir moldini steinseting omaná lind av feitari svartmold.

*Skurður y 12,25 m* (sunnari skurður). Ovast í skurðinum er tunn moldflógv, 5—30 cm. Beint undir moldini er eystantil í skurðinum tvær veggjaleivdir og millum tær og uttan fyri tær gólvskón.

Vestantil í skurðinum er undir moldini eldstaður og báðu megin eldstaðin tjúkk öskulind, upp ímóti 20 cm tjúkk. Veggjasteinarnir, sum síggjast vestast í skurðinum oman á öskuni, eru aftanfyri skurðlinjuna, og eru teir somu, sum síggjast vestast í norðara skurði.

*Húsini (3. mynd).* Teir, ið her hava velt, hava tikið allar veggir niður og beint fyri meginpartinum, so at bara sjálvt stöðið varð standandi eftir; tað nógva grótið hava teir slött higar og hagar um alla toftina. Tað var tí ógviliga torför flökja at greiða, men við at lesa okkum eftir mold-öskulindini, sum er heldur tunn, (og nú var bleyt og tvassut av regni, dagarnar rannsóknin vardi), eydnaðist kortini at fáa vissu fyri útsjónd og stödd húsanna, so sum tey vóru upprunaliga, og sum tey seinri hava verið umbygd.



*Við loyvi frá Geodætisk Institut.*

*1. mynd.* Vágsbotnurin, tikin frá flogfari, sæddur um leið sunnan. Rannsóknarökið högrumegin oman fyri miðjuna innan fyri svörtu klingruna.

*Fig. 1. (Bird's-eye view of the bottom of the creek, seen from south (approximately). Above the middle of the picture, right, within the black circle, the area of investigation).*

Húsini eru í fullari longd 17,75 m, og *(tvörtumum y 16 m)* í fullari breidd 6,70 m innan; men upprunaliga longdin hevur ikki verið meira enn okkurt um 14,50 m, tí at tann sunnasti eitt sindur mjáari parturin má vera bygdur afturat seinri, tað ið vit koma aftur til.

Einasta upprunaliga breidd, ið kann mátast, er um *y 16 m* og har 4,50 m innan.

Tey venda, sum tekningin *(3. mynd)* vísir, norður og suður, við suðurendanum móti váginum. Við fyrsta eygnabragd tykist manni hetta lögið, tí at náttúrligari sýnist á hesum heldur bratta lendi at seta tey eystur og vestur við forsíðuni móti sjónum. Hetta skulu vit nema við aftur seinri.

*Veggirnir.* Av teimum er bara stöðið eftir, og fleiri staðir heldur ikki tað. Best varðveittur er norðurveggurin, sum er 1,5 m tjúkkur ífyllingarveggur, fyllingin er mold og smágrót. Av tí upprunaliga suðurveggi, sum á *3. mynd* sæst millum *y 4,0 m* og *y 5,25 m,* er bara vestasti partur eftir, men greitt er tó, at hann er laðaður á sama hátt sum norðurveggurin og er næstan eins tjúkkur.

Av vesturvegginum er bara norðari og sunnari partur til, men tó so mikið, at eingin ivi er um, at hann bæði frá norður- og suðurveggi er bendur útá. Hann má tí hava verið mest útbendur á miðjuni og smalkað móti báðum endum, tað ið gólvskón við fundum vísir *(3. mynd, fundnummar 17 og 19).*

Vit skuldu tí vænta, at eysturveggurin hevði sama snið, men so er ikki; hann er einlaðaður og næstan beinur oman og niðan, uttan tann norðasti parturin. Atvoldin til tess má vera tann, at hann, upprunaliga laðaður sum vesturveggurin, einaferð er vorðin tikin niður í botn, og settur aftur sum hann nú er.

At hettar er beint, skuldi nevndi norðasti endi á honum víst. Hann er ífyllingarveggur, ið innan er varðveittur útá bendur frá norðurvegginum samsvarandi vesturvegginum beint yvir av; men uttan er hann skilliga umaftur laðaður fyri at beina hann eftir tí einlaðaða partinum sunnanfyri (3. og 4. mynd).




2. *mynd.* Skurðir y 12,25 m og y 16 m sæddir sunnan.

*Fig.2. (Sections y 12,25 m, and y 16 m seen from south).*

Upprunaligu húsini mega tí hava verið eggklingrut við tjúkkum ífyllingarveggjum og ongum skilarúmi, ein höll sum tann í Kvívík[1] og tann í Fuglafirði[3].

Einaferð seinri hava tey verið monnum ov lítil, og fyri at rúmka um tey hava teir tikið niður eystara veggin, laðað hann aftur sum skilarúm við 1,0 m breiðum duri inn í rúm, sum bygt varð eysturúr. Av veggjum í hesum rúmi er tann norðari *1,5—1,15 m* tjúkki norðurveggurin til, og partur av tí eystara vegginum. Hann er órógvaður av sementrennuni eystast, og trúliga eisini suðureftir, tí at gólvskón sýntist ganga heilt oman móti *y 9 m.*

Tá ið hetta ikki var nóg mikið, byggja teir eisini eitt rúm suður úr suðurendanum við okkurt um *0,80 m* tjúkkum ífyllingarveggjum. Við tað at hesir veggir eru tynnri og öðrvísi laðaðir enn hinir ífyllingarveggirnir, eru teir neyvan laðaðir um somu tíð, og mega tí hesir vera yngri. Av teimum eru bara tann vestari veggurin og partur av tí sunnara varðveittir, tann eystari er heilt burtur; tí er ógjörligt at siga, um hann hevur gingið suður úr tí einlaðaða eysturvegginum til tann varðveitta eystasta partin av suðurvegginum í hesi afturatbygging, tað ið tað eftir tekningini *(3. mynd)* tykist, ella um hann hevur staðið longur eysturi.

Eitt ivamál var tvörveggurin í norðara parti av toftini frá eysturvegginum og til tann stóra jarðklettin og vestur frá honum. Rannsóknin vísti tó við vissu, at eisini hann er yngri enn upprunaliga höllin. Undir honum var gólvskón og stólpi ella súla, sum var kolað *(3. mynd x 7,35 - y 17,50 m).*

Hesin brendi stólpi saman við tjúkku svartmoldflánni *(2. mynd, skurður y 16 m eystast),* ið var ímkend og blandað við trækoli gevur okkum varhugan av, at elstu húsini, ella í minsta lagi norðari partur teirra, eru brend niður, og at tey síðan eru bygd aftur soleiðis, sum tey nú eru funnin.

*Gólvið* norðan fyri norðurveggin var hellusett, men gjöllari kanning vísti, at tað undir hesi helluseting eins og undir tvörvegginum er eitt annað ikki steinsett gólv, har ymsir gripir vórðu funnir *(3. mynd, fundnummar 28, 44, 45, 46, 47).*




3. *mynd.* Flatatekning av toftini.

*Fig. 3. (Plan of the house).*

Gólvið er annars ikki steinsett, men mest feit, svört mold, sandur og öska. Gólvskónin er einar *8—10 cm* tjúkk. Öskan er, sum tvörskurðurin *(2. mynd, y 12,25 m)* vísir, serliga nógv eystan- og vestanfyri eldstaðin, sum stendur í miðjuni, og er tann einasti eldstaður, ið funnin varð.

*Eldstaðurin* er ein *3,70 m* langur og *0,75 m* breiður langeldur; í miðjuni á honum er lítil kulla, sum nýtt hevur verið at steikja í ella sjóða. Í öskuni vórðu funnin leirílátabrot, bráðnað glas, brend bein, og serliga ein perla *(fundnummar 43)*. Hesin langeldur er meinlíkur langeldinum í Kvívík[1]. *(5. mynd)*.

*Tekjan* hevur verið borin uppi av 2 javnfjarum röðum av stólpum ella súlum, sum stóðu í og á gólvinum norður—suður, og hava skilað höllina sundur í 3 partar. *3. mynd* vísir, hvar í hesir stólpar eru funnir, har sæst eisini ein flatur steinur *(x 5 - y 9,75 m)*, sum uttan iva er stöðið undir stólpa.

*Tún.* Steinsetingin eystan fyri sementrennuna *(2. mynd, skurður y 16 m og 3. mynd, norðast, eystast)*, ið hevur verið vakurt sett við malargróti, er eitt tún eystur móti ánni. Við tað at steinsett er omaná svartmoldina má hetta vera gjört, aftaná at húsini vóru brend, og bygt var afturat teimum eystureftir.

## *IV Gripaskrá.*

(List of finds)

Gripirnir hava fingið savnnummar 3764 og eru her skipaðir eftir slagið; fundstaður og -nummar eru í flestum förum merkt á tekningini, 3. mynd. (fig. 3).

| Fund-nr. | |
|---|---|
| | *Fitisteinsílát.* |
| 6 | Brot, ímut öðrumegin. 56 mm langt, 49 mm breitt, 22 mm tjúkt. |
| 37 | Brot. 21 mm tjúkt. Funnið í ösku. |
| | *Leirílát.* |
| 9 | Tvey brot, ímut öðrumegin. 20 mm tjúkk. Funnin sunnan fyri langeldin |
| 10 | Brot. 18 mm tjúkt. Funnið sunnan fyri langeldin. |



*4. mynd.* Toftin, sæð norðan.

*Fig. 4. (The site seen from north).*

11 Brot av trom, ið er rundað; undir henni grunn hjóling, sum endar í hvassari röð. Sbr. Kvívík[1].

Skilliga brot av *kúputum, bollakendum íláti.* 80 mm högt, 83 mm breitt, tvörmát um tromina 45 mm, hon er 9 mm tjúkk; niðari endi 11 mm tjúkkur. Funnið sunnan fyri langeldin, tætt við fundnummar 27.

14 Trý smá brot. 8 mm tjúkk.

42 Tvey smá brot, annað av trom, ið er rundað og innábend, annað helst av íflatum botni. Sbr. Syðrugötu[2]. 42 mm högt, 32 mm breitt. Funnin í langeldinum.

48 Brot, trom av tunnum íláti, uttan iva bolla. 54 mm högt, 58 mm breitt, tvörmát um tromina 42 mm, tromin 5 mm tjúkk, niðasti partur 8 mm tjúkkur. Funnið við vesturveggin.

*Brýni.*

5 Leirskifur, veggvaksið beltisbrýni. Öðrumegin á breiðara endanum er flís brotnað av, hinumegin slætt hjólað av brýning. 81 mm langt, 20—7 mm breitt, 11 mm tjúkt.

7 Gliturskifur, beltisbrýni, brot. 60 mm langt, 12 mm breitt, 9 mm tjúkt. Funnið sunnan fyri norðara tvörvegg.
8 Gliturskifur, brot. 37 mm langt, 14 mm breitt, 8 mm tjúkt. Funnið sunnan fyri norðara tvörvegg.
12 Grót, brýnt er á aðrari breiðsíðuni. 85 mm langt, 28 mm breitt, 18 mm tjúkt. Funnið sunnan fyri langeldin tætt við fundnummar 27.
15 Gliturskifur, brot. 80 mm langt, 30 mm breitt, 24 mm tjúkt.
16 Gliturskifur, brot. 62 mm langt, 14 mm breitt, 11 mm tjúkt.
17 Steinur? Brýnt á báðum mjásíðum. 65 mm langt, 22 mm breitt, 15 mm tjúkt. Funnið vestast í gólvskónini.
18 Gliturskifur, breiðari endin er bryndur út í egg eins og meitil, sbr. Kvívík[1]. 105 mm langt, 25—14 mm breitt, annar endin 9 mm tjúkkur, hin gongur út í hvassa egg. Funnið vestan fyri langeldin.
21 Leirskifur, á báðum breiðsíðum eru foyrur brýndar við nál ella sýl. 195 mm langt, 28 mm breitt, 25 mm tjúkt. Funnið í dunga, sum varð skumpaður upp, tá ið teir gróvu niður fyri cementrennu.
23 Leirskifur, brot. 70 mm langt. Funnið í eystaru afturatbygging.
27 Leirskifur, brot. 38 mm langt, 7 mm breitt, 6 mm tjúkt. Funnið sunnan fyri langeldin.
31 Leirskifur, við annan endan er sett á at borað hol til beltisbrýni. 84 mm langt, 14 mm breitt, 9 mm tjúkt.
39 Gliturskifur. 92 mm langt, 14 mm breitt, 12 mm tjúkt.
44 Leirskifur, brot. 89 mm langt. Funnið norðast í toftini.
47 Gliturskifur, brot. 54 mm langt. Funnið norðast í toftini.
51 Gliturskifur, brotnað í trý, breiðari endin bryndur út í egg, sbr. fundnummar 18. 164 mm langt, 18—6 mm breitt, 14 mm tjúkt. Funnið í uppskumpaðari moldrúgvu.

*Handsnældurennlar.*

1 Fitisteinur, ljósagráur, flatur undir niðan, árundur omaná. Tvörmát: 34 mm, hædd: 14 mm; eygað veggvaksið. Funnin innan fyri grótlaðing í miðjuni.
2 Fitisteinur, dökkgráur á liti, flatur undir niðan, flatt árundur omaná. Tvörmát: 37 mm, hædd: 18,5 mm; eygað veggvaksið. Funnin innan fyri vesturveggin.
22 Blýggj, hvít oxygen-skón uttan, flatar öðrumegin, högt árundur hinumegin, skapaður mest sum hálvkúla. Tvörmát: 23 mm, hædd: 14 mm. Funnin niðast í sunnasta toftaparti í svartmold.
24 Fitisteinur, flatur undir niðan, flatt árundur omaná, har ið er ímskón, tí helst evnaður úr ílatabroti. Tvörmát: 42 mm, hædd: 19 mm. Funnin í gólvinum norðan fyri langeldin.
25 Fitisteinur, íflatur báðumegin. Tvörmát: 53 mm, hædd: 16 mm. Funnin í gólvinum eystan fyri langeldin.



*5. mynd.* Langeldurin sæddur norðan.
*Fig. 5. (Longfire seen from north).*

29 Fitisteinur, ljósagráur á liti, flatur öðrumegin, árundur hinumegin. Tvörmát: 42 mm, hædd: 22 mm. Funnin í sunnara parti.

32 Fitisteinur, íflatur báðumegin. Tvörmát: 39 mm, hædd: 16 mm. Funnin eystan fyri langeldin í niðastu gólvskón.

38 Fitisteinur, íflatur báðumegin; eygað skilliga telgt. Tvörmát: 30 mm, hædd: 17 mm.

52 Fitisteinur, íflatur báðumegin; eygað skilliga telgt. Tvörmát: 35 mm, hædd: 19 mm.

*Perla.*

43 Hálv blá glasperla, ið er so morlað, at ilt er at siga nakað við vissu. Tvörmát: 7,5 mm. Funnin í langeldinum.

*Klíggjasteinar til vevstað.*

26 Flöt hella, við meitlaðum holi í miðjuni. 280 mm langur, 220 mm breiður, 37 mm tjúkkur.

36 Malargrót, við högdari longdarfoyru. 150 mm langur, 111 mm breiður, 56 mm tjúkkur. Funnin í samandotnum gróti í sunnara parti innan fyri vesturveggin.

49 Malargrót, brot við longdarfoyru. 158 mm langur, 117 mm breiður, 68 mm tjúkkur. Funnin í uppskumpaðari moldrúgvu.

*Kúla?*

28 Úr steini ella leiri. Tvörmát: 27 mm. Funnin í norðara parti.

*Blýkelvi.* Lodd?

19 Hvít oxygen-skón uttan. Tvörmát: 36 mm, hædd: 12 mm. Sí Grieg[4]. Funnin vestast við innsíðu vesturveggs.

*Viksteinur.*

45 Rundaður av sliti? 83 mm langur, 54 mm breiður. Funnin í norðasta parti.

*Barksteinur?*

50 182 mm langur, 75 mm breiður, 70 mm tjúkkur.

*Sýnispartar.*

3 Hvítur steinur; zeolith.

4 Flint?

13 Griffil, kritpípuheysur, bránað glas o. a. Funnir úr moldrúgvu, ið lögd varð, áðrenn rannsóknin byrjaði.

20 Trækol.

30 Brent bein. Funnið í öskini í langeldinum.

33 Kol. Funnið í öskini eystanfyri langeldin.

34 Trækol.

40 Kol. Sí fundnummar 33. Funnið í ösku í langeldinum.

41 Trækol. Funnið í langeldinum.

46 Viðasprek. Funnið norðast í toftini.

35 Ber. Baraldur (juniperus). Funnið innanfyri vesturveggin í sunnara parti.

### V *Úrslit.*

Nærri tíðarfesting av hesum heldur lítla tilfari er neyvan gjörlig, men kortini man sumt vísa á leið, og tá serliga húsini sjálv. Tey upprunaligu húsini hava ivaleyst verið um *14,5 m long* og okkurt um *4,5 m breið* eggklingrut höll við ífyllingarveggjum og við stórum langeldi í miðjuni. Eitt húsaslag og ein byggiháttur, sum var eyðkendur og sera vanligur í víkingaöld í öllum Norðurlondum, og eisini hjá okkum, her bestu dömini eru höllirnar í Kvívík[1] og í Fuglafirði[3]. Mununrin er bara tann, at tær standa niðri við sjóarmálan, meðan henda stendur högt í tí gamla bönum, eins og húsini í Syðrugötu[2], sum, tó at tey hava annað snið, helst eisini skuldu verið víkingaaldarbústaður.

Fyri víkingaöld tala eisini flestu leirílátabrotini *(gripaskrá, fundnummar 11, 42 og 48)*, og summir av handsnældurennlunum til dömis *fundnummar 22*.

Vert er at geva gætur, at henda höll, eins og tær í Kvívík og Fuglafirði, vendur norður og suður við suðurendanum móti sjónum; hetta kann vera tilvild, men tað kann hin vegin vera serligur siður her í Föroyum í víkingaöld.

Höllin tykist brend í grund, og síðan bygd aftur á sama staði; tó nú við smærri rúmum eysturúr og suðurúr teimum upprunaligu veggjunum. Harafturat er rúm skilað frá í norðara parti.

Og soleiðis mega vit hugsa okkum, at húsini hava staðið í miðöldini. Hvussu leingi vita vit ikki, men fyri tí, at tey eru heilt gloymd, er væl hugsandi, at her hevur verið bygt langt upp í tíðina.

Hvört sum er, týdningur teirra er fyri okkum fram um alt tann, at hesin fundur gevur okkum prógv um víkinga- og miðaldarbúseting í Seyrvági, og at henda búseting hevur sama dám, sum vit nú hava kunnleika um í öðrum bygdum her á landi í somu tíðarskeiðum.

SUMMARY

The present paper deals with the results of an archaeological investigation carried out in 1957, of a settlement in a place called *við Hanusá, Seyrvágur (on the island of Vágar)*, situated high in the cultivated area. (fig. 1).

The site was very much disturbed, partly owing to tilling during centuries so that only the foundation stones of the walls were preserved in many places not as much as that *(fig. 3)*, partly owing to recent building work, by which the site had among things been intersected by a wide cementated drainage ditch *(fig. 2 and fig. 3)*.

The sections *(fig. 2)* also show that the walls are founded direct on moraine clay, and that the top soil is very shallow in most places.

As appears from the sketch plan *(fig. 3)*, the house is oriented N—S, the southern end fronting the below beach and creek. The whole length of the house is 17.75 metres and full breadth 6.70 metres inside; but the character of the walls and the extent of the floor layers show that we have to do with a building of an earlier date, to which extensions have later been added to the east and to the south.

The oldest building stretches from abt. y 20.75 metres north till abt. y 3.50 metres south, its inside length being abt. 14.50 metres and the breadth 4.50 meteres at *y 16 metres (fig. 3)*.

Although the western wall is but partly preserved and the eastern wall has been rearranged during later rebuilding, it seems obvious that the ground-plan of the house has been oval. The walls of this building are filling walls of 1.5 metres thickness, particularly distinct are the northern wall and the remains of the western wall at the north and at the south end *(fig. 3 and fig. 4)*.

The only fireplace is a longitudinal one of 3.70 metres length, placed in the central axis of the house *(fig. 5)*.

Two parallel rows of posts have carried the roof, and it is proved that some of the posts were partly supported by flat stones *(fig. 3, x 5 - y 9.75 metres)*. As in any case one of them *(fig. 3, x 7.35 - y 17.5 metres)* was charred and the layers around consisted of fat black earth containing charcoal *(fig. 2, section y 16 metres, farthest to the east)*, it seems as if at least the northern part of the house has been burnt down, which perhaps also gives an explanation as to the alteration of ground-plan and lay-out of the house, an alteration which, if that is the case, may be made during the reconstruction.

As is well-known buildings of this character and type (oval ground-plan) are to be found in all the Northern countries in the Viking period, the best examples in the Faroe Islands being found in Kvívík[1] and in Fuglafjörður[3]; therefore, it is very likely that the earliest part of the present building dates from the Viking period but it has also been in-

habited in the Middle Ages. Fragments of earthen vessels *(list of finds No. 11, 42 and 48)* and some spinning-wheels, probably lead weights in particular *(list of finds No. 22)* also speek in favour of this dating.

## BÓKMENTIR

1. *Dahl, Sverri:* Fornar toftir í Kvívík. Heiðursrit til Rasmus Rasmussen á 80 ára føðingardegnum. Tórshavn 1951, bls. 1 ff.
2. *Dahl, Sverri:* Tvey fornminni í Syðrugötu. Fróðskaparrit, 1. bók, Tórshavn 1952, bls. 167.
3. *Dahl, Sverri:* Toftarannsóknir í Fuglafirði. Fróðskaparrit, 7. bók, Tórshavn 1958, bls. 121 ff.
4. *Grieg, Sigurd:* Middelalderske Byfund fra Bergen og Oslo. Oslo 1933, bls. 373, fig. 328.